DUNLOP GOODYEAR

TOYOTA

TEAM85



## Røttu dekkini til røttu prísirnar...

1. mai er eisini fyrsti várdagur á koyribreytunum. Píkarnir skulu vera goymdir burtur og bilurin skøddur til summarið.
Hóast onkur hissini hvítur skúrur enn kann koma, er tað hugaligt at vita, at bilurin aftur kann fáa rættiligt tak á koyribreytini.
Hygg inn ella ring til okkara og fá meira vita um dygdir og prísir á nýggju summardekkunum.

Umframt dygdar dekk og kappingarførar prísir, bjóða vit **ókeypis áseting og avbalansering** av nýggju dekkunum. Kom inn á gólvið og vit gera bilin kláran til summarið.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F



# Avbjóðingar á Deildartænastuni

Søkt verður eftir dugnaligum starvsfelagum til avbjóðandi størv á Deildartænastuni í Føroya Sparikassa.

Deildartænastan tekur sær av týðandi avgreiðsluuppgávum í Føroya Sparikssa, t.d. avgreiðslu av virðisbrævahandlum og øllum gjaldingum til og úr útheiminum. Harumframt tekur deildin sær av umsiting og skráseting av kundaviðurskiftum, so sum stovnan av lánum og tinglýsing.

Søkt verður eftir 2 starvsfelagum:

**Starvsfólk til avgreiðslu av virðisbrøvum**
Vit leita eftir einum starvsfelaga, ið kann hava dagligu avgreiðsluna av virðisbrøvum og gjaldføri um hendi, avstemma kontur hjá korrespondentbankum okkara og umsita flytingar í SWIFT-skipanini. Harafturat koma ymiskar ad-hoc uppgávur.

**Starvsfólk til skráseting**
Vit leita eftir einum starvsfelaga at arbeiða við umsiting og skráseting av kundaviðurskiftum. Ein partur av starvinum er eisini útskriving av skjølum og skjalagoymsla. Harafturat koma ymiskar ad-hoc uppgávur.

Í báðum størvum er nógv samskifti bæði innan- og uttanhýsis, og ábyrgdarkensla og samstarvsevni eru av stórum týdningi. Umsøkjarar skulu vera nærlagdir og tænastusinnaðir.

Deildin er merkt av tøttum samstarvi og til tíðir er stórt arbeiðstrýst á deildini; tí er neyðugt at kunna arbeiða í toymi eins væl og sjálvstøðugt.

Føroya Sparikassi er eitt spennandi og avbjóðandi arbeiðspláss við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Tey, ið sett verða, fáa neyðugu upplæringina til at røkja størvini, men viðkomandi útbúgving, eitt nú innan peningastovnsøkið, er ein fyrimunur. Arbeiðsstaðurin er Yviri við Strond í Havn og lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Elina Sigvardsen, deildarleiðara, á telefon 348290 ella við telduposti til: elin.sigvardsen@sparikassin.fo ella Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, á telefon 348510 ella við telduposti til: marjun.eystberg@sparikassin.fo

Størvini verða sett skjótast gjørligt og umsókn skal vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. mai.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

pedur & petur • 320870

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á Deildartænastuni starvast 14 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI